# Háfoss sóknast eftir ST-yvirlýsing

**Hóast tað varð kunngjørt føroyingum, so varð ongin fráboðan nakrantíð send Sameindu tjóðum um, at føroyingar eru tjóð við sjálvsavgerðarrætti. Nú fregnast Kristina Háfoss løgtingskvinna eftir, um løgmaður fer at standa við síni orð**

ST-FRÁBOÐAN
*Ingi Rasmussen*

Føroya fólk er tjóð við ómissandi og framhaldandi sjálvsavgerðarrætti.

Hetta samtykti løgtingið í síðsta valskeiði í sonevndu samtyktini um sjálvstýri Føroya fólks. Tjóðarspurningurin var eisini ein grundleggjandi ósemja, sum førdi til, at samráðingar um at skipa Føroyar sum fullveldi slitnaðu millum donsku stjórnina og landsstýrið í 2000.

Tá varð sagt, at nú skuldu føroyingar sjálvir fremja fullveldi heima í Føroyum, og løgmaður skuldi fráboða ST, at føroyingar eru tjóð við sjálvsavgerðarrætti. Men enn er ongin fráboðan farin frá løgmanni til Sameindu tjóðir, og tað er heldur onki, sum ber á tað borðið. Tað hevur fingið Kristinu Háfoss, løgtingskvinnu fyri Tjóðveldisflokkin, at seta Anfinni Kallsberg løgmanni fyrispurning. Hon vil hava løgmann at svara sær, hví hann ikki enn hevur boðað Sameindu tjóðum frá løgtingssamtyktini frá 2001 við atliti til sjálvsavgerðarrætt føroyinga. Hon vil eisini hava at vita, um løgmaður yvirhøvur hevur ætlanir um at senda áheitan til ST, har biðið verður um at fáa staðfest og viðurkent, at føroyingar eru tjóð við sjálvsavgerðarrætti. Og um so er, nær.

– Føroyingar, altjóða serfrøðingar og Løgtingið eru samd um, at føroyingar eru tjóð við sjálvsavgerðarrætti sambært altjóða rætti. Danska stjórnin er ikki samd og metir ikki, at føroyingar eru tjóð. Fyri hvønn dag, ið gongdur, viðurkenna føroyskir myndugleikar tískil óbeinleiðis, at føroyingar ikki hava altjóða viðurkenning sum tjóð við sjálvsavgerðarrætti. Tí er ongantíð ov skjótt at fáa eina altjóða staðfesting av hesum rættindum, sigur Kristina Háfoss.

Kristina Háfoss vísir á, at føroyingar lúka allar altjóðarættarligar treytir fyri at vera tjóð við sjálvsavgerðarrætti. Hon heldur tað eisini hava stóran týdning at fáa tað staðfest í ST, tí tað vildi givið føroyingum rættindi á altjóða støði.

Tjóðir, ið hava rættindi til sjálvsavgerðarrætt, hava nevniliga støðu sum partur í altjóðarætti. Neyðugt er ikki at vera fullveldisríki, men neyðugt er at lúka treytirnar fyri at vera tjóð og at vera altóða viðurkend sum tjóð, sigur Kristina Háfoss.



# Stór oljudálking á Nólsoyarfirði

**Ongin hevur meldað seg fyri umfatandi oljudálkingina á Nólsoyarfirði, sum varð funnin mikudagin. Aftur hósdagin sást dálking, hesaferð uttan fyri Hoyvík, og tá MRCC-støðin fór út at kanna støðuna, vildi Djóni Weihe ikki útihýsa, at tað kundi verða neyðugt at taka oljuna uppaftur**

DÁLKING
*Ingi Rasmussen*

Ein stór oljudálking er funnin á Nólsoyarfirði.

Mikudagin um middagsleiti fekk sjóbjargingarstøðin hjá MRCC fráboðan um, at eitt stórt øki á fjørðinum varð dálkað. Talan er um tjúkka svarta olju, helst smyrjiolju, sum hevði ein sterkan lukt. Aftur hósdagin sást olja við Hoyvíkina, og leiðarin á MRCC-støðini roknar við, at talan er um eina og somu dálkingarkeldu.

– Vit vóru úti við tyrluni mikudagin og kannaðu, men eg dugi ikki at siga, hvussu nógvir litrar talan man vera um. Tað sá rættiliga umfatandi út, men vit máttu gevast, tí myrkrið kom á okkum, so tað er ilt at siga. Nú fara við útaftur við tyrluni at hyggja nærri eftir, segði Djóni Weihe, tá Sosialurin tosaði við hann fyrrapartin hósdagin.

Tær fyrstu rannsóknirnar vístu, at tað er dálkað millum Stong og Eystnes, norðureftir ímóti Tangafirði og nakað suður í fjørðin. MRCC-støðin hevur eisini fingið fráboðan um, at olja er sædd longri suðuri, so tað er greitt, at talan er um eitt stórt øki.

Hvør oljukeldan er, hevur Djóni Weihe onki boð uppá. Enn hevur ongin meldað seg.

Fleiri russisk skip liggja á Redini, so tað kundi verið eitt av teimum, men tað kunnu eins væl vera onnur skip, tí nógv skip sigla ígjøgnum Nólsoyarfjørð hvønn dag.

Í fyrstu atløgu roknaði Djóni Weihe við, at oljan fór at reka suðureftir til havs við sjóvarfallinum, men tá olja aftur varð funnin hósdagin við Hoyvíkina, helt hann, at tað kundi gerast neyðugt við eini bjargingarætlan.

– Tann heilt tunna filmin verður onki gjørt við, men tá talan er um svarta olju, ið rýkur illa og fevnir um eitt stórt øki, so kann tað gerast neyðugt at fáa oljuna upp, og tað ber til, sigur Djóni Weihe.

MRCC-støðin hevur havgangandi útgerð, sum kann takast í nýtslu, men tað tekur tíð at rigga hana til. Skip skal fáast inn, útgerðin skal fáast á keiina, hon skal lossast umborð, og síðan skal hon setast út á havinum. Tvey skip skulu til, tí eitt má vera í hvørjum enda.

Tað ganga sostatt nakrir tímar, áðrenn útgerðin er á staðnum, og tí kann tað vera trupult hesa árstíðina, tá tað er ljóst so stutt. Áðrenn blaðið fór til prentingar vistu vit tó ikki, um tað var neyðugt at gera nakað.

Ein stór oljudálking var funnin á Nólsoyarfirði. Oljan, ið var tjúkk og svørt, rak millum Stong og Eystnes, heilt norður ímóti flesuni, og hon gekk eisini suðureftir fjørðinum.



# Niðurstøða á gáttini

BORGARSTJÓRASKIFTI
*Ingi Rasmussen*

**Tvøroyri:** Kommunudeildin hjá Løgmálaráðnum kannar, um borgarstjóraskifti í Tvøroyrar býráð er í samsvari við kommunulógina.

Finnleif Guttesen segði seg úr starvi sum borgarstjóri av persónligum ávum, og Kristin Michelsen tók yvir, júst tá valskeiðið varð hálvrunnið. Tað líktist einari kreativari uppsøgn. Ein borgarstjóri skal sambært kommunulógini sita í fýra ár, og ein avtala millum teir báðar um at skifta sess eftir hálvt valskeið varð tískil vrakað av Kommunala eftirlitinum.

– Vit hava biðið um øll skjølini í málinum. Hetta verður skjótt avgreitt. Vit hyggja eftir, um eitt nú gerðabókin hjá býráðnum samsvarar við lóggávuna, og tað verður ikki leingi, áðrenn vit koma til eina niðurstøðu, sigur Hilmar Høgenni av Kommunudeildini hjá Løgmálaráðnum.





*Strandferðslan, Klaksvíkar kommuna og ferðavinnan í Norðoyggjum avmyndað saman eftir fundin teirra millum í býráðshúsinum týsdagin*

# Strandferðslufundur í Klaksvík

**Týsdagin var fundur millum Strandferðsluna og Klaksvíkar kommunu, har millum annað varð tosað um tænastustøðið hjá Strandferðsluni**

STRANDFERÐSLAN
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Tað var Klaksvíkar kommuna, sum tók stig til henda fundin. Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri sigur, at tað var eitt ynski frá kommununar síðu at fáa ein fund við Strandferðsluna um leiðirnar úr Klaksvík til Leirvík og yvir á Kalsoynna. Og tí tók kommunan stig til fundin og bjóðaði Poul Jákup Thomsen, ferðafólkaflutningsleiðara og Kristian Davidsen, stjóra á Strandferðsluni á fund í Klaksvík. Á fundinum vóru eisin umboð fyri ferðavinnuna í Norðoyggjum, formaðurin Finn Johannessen og kunningarleiðarin Christian Olsen.

Allir partar lótu væl at fundinum og søgdu, at nógv varð tosað og væl.

Størsti parturin av tosinum snúði seg um kunning sum heild. Um hvussu Strandferðslan og onnur, sum hava tørv á at kunna ferðafólk um ymisk viðurskifti kunnu finna eina ella aðra felagsskipan upp á manglandi kunningina í Norðoyggjum. Har komu partarnir millum annað inn á eina felagsskelting kring landið, sum er í umbúnað.

Kristian Davidsen segði, at áheitanin úr Klaksvík varð vælmóttikin, tí Strandferðslan er altíð tilreiðar at tosa um tingini. Men hann legði eisini afturat, at Strandferðslan hevur fingið karmar at arbeiða innanfyri, og so ræður um at fáa tað besta burturúr.

– Og tað kann best gerast í samstarvi við teimum, sum varða av staðnum, tí tað er eyðsæð, at kommunan hernorðuri veit betur, hvat rørist millum fólkið her, enn vit, sum sita á okkara skrivstovum í Havn. Tí er hetta ein avbera góður møguleiki at fáa tosa um nøkur viðurskifti og møguliga loyst onkrar praktiskar trupulleikar, sum ikki neyð-ugt kosta so nógv, sigur stjórin á Strandferðsluni.

Eisini var tænastustøðið hjá Strandferðsluni uppi og vendi, har Steinbjørn Jacobsen nevndi nøkur dømi upp á fólk, sum eru komin við hjartasuffum um Strandferðsluna.

Á fundinum varð eisini tosað um Dúgvuna, Ternuna og Sam. Sum er røkir Dúgvan farleiðina millum Klaksvík og Leirvík, og Sam er settur inn afturat til vinnuna, tí Dúgvan ikki nøktar tørvin. Poul Jákup Thomsen segði, at sum heild eru bert positivar afturmeldingar komnar um tað.

Men síðani Ternan gavst at sigla um Vestmannasund, hevur tosið í Norðoyggjum verið um at fingið Ternuna í staðin fyri Sam. Til hetta segði Strandferðslan, at alt er møguligt, men spurningurin er, hvussu tað skal fíggjast. Serliga nú Strandferðslan skal spara.

Men teir báðir frá Strandferðsluni nýttu eisini høvi til at vísa á, at tað er munandi bati hendur á leið 50, sum er millum Klaksvík og Leirvík.

– Vit eru komin upp á einar 10.000 túrar um árið, og tað er ein stór øking, sigur Poul Jákup Thomsen, sum heldur, at tað eigur at verða hugt at, hvar vit vóru fyri nøkrum árum síðani, og hvussu langt vit eru komin í dag.

Viðvíkjandi leið 56, sum er millum Klaksvík og Kalsoynna, varð tosað um komandi ferjuleguna á Syðradali. Hon ger, at Barsskor,sum er farin væl upp um pensjiónsaldur, ikki longur fer at røkja ta leiðina. Tosað hevur verið um, at Sam skal røkja ta leiðina, men har er onki fastlagt enn. Og hvat síðani hendir við Barsskor er heldur ikki greitt.

Í høvuðsheitum snúði fundurin seg mest um at fáa kunningina betri til út til fólkið og harvið at veita eina betri tænastu.




# Roknskapurin hjá Norðoya Sparikassa góðkendur

**Á nevndarfundi tann 4. februar 2003 viðgjørdi og góðkendi nevndin hjá Norðoya Sparikassa roknskapin fyri 2002**

ROKNSKAPUR
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Úrslitið fyri 2002 gjørdist eitt avlop áðrenn skatt upp á 27,2 milliónir krónur. Endaliga ársúrsltitið eftir skatt gjørdist 21,3 milliónir krónur móti 19,8 milliónum í 2001.

Innlánið hjá Sparikassanum øktist við 5, 2 % úr 837 milliónum til 880 milliónir, meðan útlánið øktist við 14 % úr 697 milliónum til 794 milliónir. Eisini var øking í inntøkunum og útreiðslunum upp á ávíkavist góðar fýra milliónir og tríggjar milliónir krónur.

Eginpeningurin vaks við 10, 6 milliónum og er nú 224 milliónir krónur, sum er 20,1 % av samlaðu fíggjarstøðuni, ið tann 31. desember javnvigaði við 1.115 milliónum krónum.

Norðoya Sparikassa hevur aðalfund týsdagin tann 25. februar 2003 klokkan 15.

### Høvuðstøl úr ársroknskapi 2002

tøl í mill. kr.

| **Rakstrarroknskapur** | **2002** | **2001** |
|---|---|---|
| Netto rentu- og kostnaðarinntøkur | 55,8 | 51,6 |
| Virðisjavnan av lánsbrøvum, gjaldoyra o.ø. | 3,1 | 2,3 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 2,8 | 1,2 |
| Útreiðslur til starvsfólk, umsiting og aðrar vanligar útreiðslur | 28,7 | 25,7 |
| Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 0,9 | 1,1 |
| Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar | 5,0 | 4,2 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **27,2** | **24,1** |
| Skattur | 5,8 | 4,3 |
| **Ársúrslit** | **21,3** | **19,8** |
| **Høvuðstøl úr fíggjarstøðuni** | | |
| Innlán | 880 | 837 |
| Útlán | 794 | 697 |
| Eginpeningur | 224 | 203 |
| **Fíggjarstøða íalt pr. 31. desember 2002** | **1.115** | **1.054** |